# H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

Tórshavn, hin 02. mai 2000
Málnr.: 615-000283-5
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: RT

Faroe Salmon P/F
Kjalarvegur 19
FO-700 KLAKSVÍK

**UMHVØRVISGÓÐKENNING AV ALISTØÐINI HJÁ P/F POLARLAKS**

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita P/F Polarlaks umhvørvisgóðkenning til alistøð á Hvannasundi.

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av, at felagið hevur galdandi loyvisbræv til aling á sjónum frá Vinnumálastýrinum.

Støddin og staðsetingin av alistøðini verður sett í loyvisbrævinum.

Umhvørvisgóðkenningin er tíðaravmarkað til 5 ár frá tí degi, hon er almannakunngjørd.

Umsókn um at endurnýggja umhvørvisgóðkenningina skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi eitt hálvt ár, áðrenn henda umhvørvisgóðkenning er úti.

## Umsóknin

P/F Polarlaks fekk 1. november 1990 sítt núverandi aliloyvi á Hvannasundi. Loyvi varð givið til í mesta lagi 3.000 m² á 4 ávísum økjum (sí skjal 1, 2 og 3).

Í 1996 yvirtók P/F Faroe Salmon alingina hjá P/F Polarlaks. Tann 25. september 1998 fekk felagið umhvørvisgóðkennng til sítt virksemi, sum tá var savnað á einum øki norðanfyri Hvannasund við Viðoyarlandið.

Hetta økið ynskir felagið í dag at víðka, og hevur felagið tann 3. apríl 2000 søkt um umhvørvis-góðkenning til hesa víðkan (sí skjal 4).

## Lýsing av alistøðini

Botn- og streymviðurskiftini, har sum alistøðin skal liggja, eru ikki kend, men kanningar skulu gerast av hesum í sambandi við at metast skal um, hvussu stóra framleiðslu økið umhvørvisliga megnar. Dýpið á staðnum er, sambært korti hjá Landsverkfrøðinginum, 10-75 m.

Debesartrøð
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 31 53 00**
Fax. **+298 31 05 08**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Umframt aliútbúnað á sjónum umfatar støðin nakað av útbúnaði á landi, so sum goymslur, bingjur o.l.

Í sambandi við fyrstu góðkenningina hjá felagnum gjørdi HS vart við, at støddin av alistøðini ikki var í samsvar við loyvisbrævið frá Føroya landsstýri. Í dag hevur Vinnumálastýri tikið stig til at upptekna øll aliøkir av nýggjum og er bert at vóna, at hetta stig hevur við sær, at økisviðurskiftini hjá P/F Polarlaks í Hvannasundi verða formaliserað sum skjótast.

**Málsviðgerð**

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:

- Tá ið streym-, lívfrøðiligar og evnafrøðiligar kanningar eru gjørdar av viðurskiftinum við aliøkið, ásetir Heilsufrøðiliga starvsstovan, hvussu stóra framleiðslu felagið í mesta lagi má hava á økinum.

**Góðkenningartreytir**

**1 Innrætting**

1.1 Alistøðin skal liggja á góðkenda staðnum og lúka treytirnar, sum eru settar í loyvinum frá landsstýrinum.

1.2 Um alistøðin viðførir týðandi dálkan á umhvørvið, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan krevja, at alistøðin verður flutt ella broytt soleiðis, at ávirkanin á umhvørvið verður innanfyri ásett mørk.

1.3 Nótirnar mugu ikki stinga meira enn 2/3 av dýpinum á staðnum.

1.4 Fóðurgoymslur á landi og úti á flakum skulu vera vardar ímóti regni og vindi og vera innrættaðar soleiðis, at møguligir lekar kunnu haldast aftur og takast upp. Fóðurgoymslur skulu vera læstar fyri óviðkomandi.

1.5 Heilivágur og kemikaliir, sum kunnu hava dálking við sær, skulu vera vard ímóti regni og vindi. Plássið skal vera læst fyri óviðkomandi, og møguligir lekar skulu kunna haldast aftur og takast upp.

1.6 Tað má ikki goymast meiri av kemikalium og heilivági - úti á flakum - enn tað, sum svarar til nýtsluna í ein dag.

1.7 Spillvatn frá vatnklosettum í tilknýttum bygningum - á landi og úti á flakum - skal leiðast til rottanga ella reinsiverk, áðrenn hetta verður leitt á sjógv.

**2 Rakstur**

2.1 Deyður fiskur skal takast upp hvønn dag.

2.2 Verður fiskurin slaktaður á alistøðini, skal hann blóðgast sambært galdandi vegleiðing frá Landsdjóralæknanum.

2.3 Fiskur má ikki kryvjast á aliringunum ella har nærhendis.

2.4 Um tað gerst neyðugt at slakta allan fiskin í aliringunum, skal umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin kunnast um hetta.

2.5 Nótir skulu í minst møguligan mun impregnerast, men eiga í staðin at røkjast við vanligari reingerð ella á annan umhvørvisvinarligan hátt.

2.6 Skulu nótir impregnerast, skal hetta fara fram á einum virki, sum er góðkent til slíkt.

2.7 Ikki er loyvt at spula, ella á annan hátt fáa avleiringar burtur undan alistøðini, uttan eitt serligt loyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni frammanundan.

2.8 Raksturin skal fara fram soleiðis, at øll økir, sum hoyra til støðina, eru ruddilig og rein.

## 3 Fóður

3.1 Tað er bert loyvt at brúka turrfóður á alistøðini.

3.2 Ein vørulýsing skal kunna skjalprógva evnini í fóðrinum.

3.3 Fóðringin skal fara soleiðis fram, at spillið gerst minst møguligt.

3.4 Lutfallið millum ta brúktu nøgdina av fóðri og ta framleiddu nøgdina av fiski má ikki verða størri enn 1,2.

## 4 Burturkast

4.1 Alt burturkast skal skiljast sundur í:

- brennbart
- ikki brennbart
- vandamikið
- lívrunnið burturkast

4.2 Tað, sum kann brennast, og tað, sum ikki kann brennast, eins og tað vandamikla burturkastið skal latast kommunalu burturkastsskipanini.

4.3 Lívrunnið burturkast, herímillum slógv, deyður fiskur og fóðurleivdir, skal savnast saman, verða goymt og fáast av vegnum sambært kunngerð nr. 40 frá 1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni. Hetta hevur við sær fylgjandi krøv:

- tað lívrunna burturkastið skal savnast saman og verða goymt í einum fullkomiliga tøttum kassa.
- kassin skal standa soleiðis, at hann lættliga kann umlastast, uttan at akfør koma inn á arbeiðsøkið hjá støðini.
- um burturkastið ikki verður viðgjørt á staðnum (súrløguviðgerð ella frysting), skal tað flytast dagliga til góðkendan móttakara.
- flutningur av burturkastinum skal fara fram í einum fullkomiliga tøttum ílati.
- um eigarin sjálvur hevur flutningin um hendi, skal hann tryggja sær, at móttøkustaðið letur váttan fyri móttøkuna.
- flutningsakfarið skal sóttreinsast eftir hvørja avlasting.

4.4 Móttakarin av lívrunnum burturkasti skal upplýsast um slag og samanseting av burturkastinum, herundir um innihald av møguligum heilivágsleivdum.

4.5 Heilivágur og kemikaliuavlop skal verða goymt trygt í tøttum ílati og á einum læstum stað, til tað verður latið kommunalu burturkastsskipanini.

## 5 Óljóð

Tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá alistøðini má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk í teimum nevndu tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. - frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Mest loyvda óljóðstøðið frá alistøðini mált innandura í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

**6 Luft- og ljósdálking**

6.1 Alt virksemi á alistøðini skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær lukt- ella støvampar í nærumhvørvinum.

6.2 Nýtslan av ljósum á alistøðini skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær umhvørvisligan ampa.

**7 Innaneftirlit**

7.1 Eina ferð árliga skulu sedimentssýni takast undir og rundan um alistøðina. Títtleikin av sýnunum kann verða broyttur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

7.2 Fyrsta kanningin skal gerast á sumri í ár 2000 og skal frágreiðingin fyri úrsliti av kanningini vera HS í hendi í seinasta lagi tann 1. november 2000.

7.3 Hvar sýnini skulu takast, skal ásetast nærri í samráð við Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Sýnini eiga at verða tikin seint á sumri, umleið august/september mánaði á hvørjum ári.

7.4 Sýnini skulu kannast fyri turrstof, gløðitap, pH, redoxpotentiali, innihald av total-fosfor, total-nitrogen og innihald av kopari og zink. Sýnini skulu lýsast kvalitativt við atliti til fauna, sedimenttjúkd, lukt, lit, konsistens, um bløðrur síggjast, fóðurspill og fækaliir

7.5 Sýnini skulu takast og kannast av einari starvsstovu, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

7.6 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja prógv fyri, at krøvini í sambandi við óljóð verða fylgd.

7.7 Streymkanningar skulu gerast av aliøkinum. Kanningarnar skulu verða av einari slíkari góðsku, at úrslitini kunnu nýtast í eini nærri meting av framleiðslumegini hjá økinum.

7.8 Allar sýnistøkur og kanningar sambært hesi góðkenning skulu gjaldast av alaranum.

7.9 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann broyta innaneftirlitsskipanina soleiðis, at hon gerst meiri hóskandi.

7.10 Um úrslit av botnkanningum vísa, at dálking ferð fram, sum ikki er uttan týdning, so kann Heilsufrøðiliga starvsstovan seta krøv um bøtandi atgerðir.

**8 Rakstrareftirlit**

8.1 Ein rakstrarbók skal dagliga førast fyri alistøðina. Rakstrarbókin skal innihalda upplýsingar um fóðurnýtslu, vaksinur og upplýsingar um, hvussu nógvur fiskur er sleptur út í ringarnar og hvussu nógvur er tikin, hvussu nógvur fiskur er deyður í ringunum og hvussu nógvur er sloppin.

8.2 Um sjúka kemur í, skal nøgd og slag av heilivági og tíð fyri viðgerð førast inn í rakstrarbókina.

8.3 Rakstrarbókin skal havast í varðveitslu á alistøðini, vera atkomandi hjá eftirlitsmyndug-leikanum og kunna vísast fram, um tað verður kravt. Bókin skal goymast í 5 ár.

8.4 Ein árlig uppgerð skal gerast, sum skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

- útseting av smolti, vekt og mongd
- vaksinustøða hjá tí útsetta smoltinum
- nettoframleiðsla, vekt eftir slaktingina
- bruttoframleiðsla, vekt undan slaktingini
- deyður fiskur, vekt
- sloppin fiskur, mett vekt
- framleiðslumongd, ið er tann fiskanøgd, sum er á alistøðini pr. 31/12, samanlagt við bruttoframleiðslu, deyðum fiski, slopnum fiski, vrakaðum fiski, og frádrigið fiskanøgd á alistøðini pr. 1/1, og samanlagt við nøgdini av útsettum smolti í tíðarskeiðnum
- fóðurnýtsla, vekt, liðað sundur í slag og samanseting
- útroknað fóðurlutfall, sum er kg. fóðurturrstof pr. kg. framleiðslumongd
- heilivágs- og kemikaliunýtsla, við upplýsingum um mongd, slag og samanseting
- mongd av lívrunnum burturkasti, hvussu tað er viðgjørt og hvørjum tað er latið
- mongd av vandamiklum burturkasti, sum er latið til kommunalu burturkastsskipanina
- innaneftirlitsdata (sum lýst undir punkt 7)

Ársuppgerðin skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári.

## Almennar treytir

Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting. Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við støðini. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

## Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann kærast til Føroya landsstýri, sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðani sendir Føroya landsstýri kæruna við teimum skjølum, sum eru í málinum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Tórshavn, hin 4. mai 2000

Bárður Enni,
stjóri

/

Jacob P. Joensen,
deildarleiðari

**Hjálagt:** Skjal 1, 2, 3, 4.

**Avrit:** Hvannasunds kommuna, FO-740 Hvannasund
Viðareiðis kommuna, FO-750 Viðareiði
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Landsdjóralæknin, FO-410 Kollafjørður
Náttúrufriðingarnevndin fyri Norðoya sýslu, FO-700 Klaksvík.